# Geza gjørdist hetjan




*Toppskjúttin í fjør, Finnur Justinussen, brendi eisini í brotssparkskappingini*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

**LØGMANSSTEYPIÐ** Víkingur og AB noyddust at spæla í 120 minuttir og skuldu skjóta fimm brotsspørk hvør, áðrenn tað varð greitt, hvør slapp at halda fram í kappingini um Løgmanssteypið. Málverjin Geza Turi gjørdist hetjan

Uni Holm Johannesen

Seinasta skotið átti Stig-Roar Søbstad. Hann misnýtti. So var AB úti. Geza Turi var fyri.

Dysturin í Sarpugerði í gjár var framúr. Har var nær um alt. Mál. Nærdystir. Spenningur. Hetjur. Brotssparkskapping. Glaðar vinnarar. Og sera vónbrotnar taparar.

Víkingur vann seg í gjár víðari í hálvfinaluna í kappingini um Løgmanssteypið. Men klokkan var farin av seks-talinum, tá áskoðararnir sluppu til hús.



*Toppskjúttin í Vodafonedeildini, Stig-Roar Søbstad, brendi avgerandi brotssparkið*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

### Javnt

Eftir vanligu leiktíðina stóð á jøvnum. Súni Olsen hevði stýrt bóltin við høvdinum í netið, tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin. Men miðskeiðis í seinna umfarinum javnaði Tehe Aristide, tá hann var fyrstur á bóltinum eftir fríspark.

AB hevur serliga havt trupulleikar í verjupartinum í hesumm kappingarárinum. Málini hava nær um raplað inn í málið handan Tórð Thomsen. Men fýra teir aftastu vóru stinnir í Sarpugerði í gjár.

Hinvegin gekk minni væl at skjóta mál. Gestirnir av Argjum spæIdu seg í løtum til góðar støður, men tað var sjáldan, at Geza Turi í málinum varð settur undir trýst.

Dysturin var serliga merktur av mongu nærdystunum. Víkingur hevur ikki verið sannførandi í sínum spæli higartil í ár, hóast úrslitini ikki hava verið av leið. Í gjár vunnu teir seg í hálvfinaluna uttan sannførandi spæl. Tað skulu teir eisini hava rós fyri.

Avgerðin fall, tá seinasta skotið í dystinum fall. Stig-Roar Søbstad fekk ikki bóltin framvið Geza Turi, sum bjargaði. Víkingur er í hálvfinaluni.

## Brotssparks-kappingin:

**Víkingur:** Súni Olsen til 2-1
**AB:** Gunnar Haraldsen misnýtti
**Víkingur:** Sølvi Vatnahamr til 3-1
**AB:** Nikolaj Eriksen til 3-2
**Víkingur:** Sam Jacobsen til 4-2
**AB:** Mortan úr Hørg til 4-3
**Víkingur:** Atli Gregersen til 5-3
**AB:** Evrard Blé til 5-4
**Víkingur:** Finnur Justinussen misnýtti
**AB:** Stig-Roar Søbstad misnýtti